## Com-Data og Konica Minolta gjørt sáttmála

Í apríl mánaði gjørdu KT-fyritøkan Com-Data P/F og Konica Minolta í Danmark sáttmála sínámillum um sølu, viðlíkahald og tænastu av kopimaskinum. Samráðingarnar við Minolta Danmark A/S byrjaðu seinasta ár, men av tí at Minolta í fjør legði saman við Konica, so hava samráðingarnar drigið út. 1. november í fjør broytti Minolta navn til Konica Minolta Business Solutions Denmark a/s.

Minolta byrjaði at selja kopimaskinur longu í 1973, og í dag selur Konica Minolta bæði kopimaskinur, printarar, skannarar, telefax og annað. Konica Minolta hevur eitt ógvuliga breitt úrval av kopimaskinum, til ein sera kappingarføran prís. Úrvalið dekkar einhvønn tørv hjá einari fyritøku ella stovni óansæð stødd. Maskinurnar kunnu kopiera bæði í litum og s/h, hekta og hola, gera faldarar, sanghefti, brochurir og so framvegis.

Sáttmálin millum Com-Data og Konica Minolta umfatar í fyrstu atløgu bert kopimaskinurnar. Á KT-stevnuni, sum var í Norðurlandahúsinum í apríl mánað, var eitt umboð frá Konica Minolta við á básinum hjá Com-Data og vísti fram 3 ymisk sløg av kopimaskinum, eina lítla, eina miðal og eina stóra.

Fleiri viðskiftafólk nýttu høvi at vitja básin hjá Com-Data og síggja kopimaskinurnar frá Konica Minolta.

## Norðuratlantisk kórkonsert á Atlantsbryggjuni

Fríggjadagin 7. mei og leygardagin 8. mei, verður stór kórstevna á Atlantsbryggjuni í Keypmannahavn.

Talan er um føroysk, íslandsk og grønlendsk kór, sum savnast í Keypmannahavn at synga saman.

Í 2001 var tað føroyski Tróndur Bogason, sum komponeraði eitt verk, ÐQ, sum bleiv sungið á øllum fýra málunum í senn. Í ár er tað íslendski Hugi Guðmundsson, sum hevur skrivað eitt kórverk, nevnt Effigiem Christi, fyri stórt blandað kór og minni kvinnukór.

Síðstu ferð vóru tað føroyski Sunleif Rasmussen og svenski Gunnar Eriksson, sum stjórnaðu kórunum, í ár verða tað íslendski Bernharður Wilkinson og grønlendski Mads Lumholdt, sum fara at stjórna kórunum.

Eisini verða framførd onnur smærri kórverk. Av føroyskum verða m.a. Pauli í Sandágerði, sum fer at stjórna Infant Joy, og Sámal Matras Kristiansen, Nú líður móti summartíð.

Meira er at lesa á www.nakf.dk

**eys**

## Kórkonsert í Gøtu kirkju



Leygarkvøldið kl 19.00 fær felagskórið Gøta/Leirvík vitjan av kórinum Sólarmagn úr Kirkjubø. Hesi bæði kórini fara at hava eina felags konsert í Gøtu kirkju.

Fyrst farmførir Sólarmagn. Tey fara at syngja kingo sálmar, verk eftir modernað føroysk tónaskøld, Niels la Cour og J.Brahms.

Felagskórið Gøta/Leirvík fer at framføra føroyskar sálmar og sangir, umframt onkrar norðurlendskar kórperlur.

At enda framføra kórini tveir sangir saman.

Við á konsertini vera eisini tveir ungir, evnaríkir klaverleikarar, sum fara at framføra hvør sítt stykki. Talan er um 18 ára gomlu Lív og beiggja hennara Jósef, sum er 15 ár. Lív hevur fingið undirvísing í nøkur ár og hevur síðan lært beiggja sín at spæla klaver.

**eys**



*Vága Dansifelag skipar um vikuskiftið fyri afturvendandi landsdansistevnuni, sum í ár verður á Giljanesi. Fyrsta landsdansistevnan varð hildin í Vágum í 1983 eftir hugskoti frá táverandi formanninum í Vága Dansifelag, Jónvør Petersen, sum sæst fremst á myndini.*

*Myndin er frá norðurlendskari dansistevnu, sum Vága Dansifelag skipaði fyri á Giljanesi í fjør*

# So føgur tá falla mær rím

**Umleið hálvtsættahundrað dansarar úr øllum landinum, umframt eisini nakrar uttaneftir, seta um vikuskiftið hvørjum øðrum stevnu á Giljanesi, har regluliga landsdansistevnan verður hildin**

FØROYSKUR DANSUR
*Edvard Joensen*

Afturvendandi landsdansistevnan fyri dansifeløgini, ið dansa føroyskan dans, verður hildin í Vágum um vikuskiftið. Umleið hálvtsættahundrað fólk fara at luttaka.

Tað er Vága Dansifelag, sum í ár er vertur fyri landsdansistevnuni, ið verður hildin triðjahvørt ár. Fyrsta stevnan av hesum slagi varð hildin í Vágum í 1983, og nú hevur hon verið runt hjá feløgum í øllum landinum og er afturkomin til upprunan.

Tó er stevnan nakað væl broytt, siga tey, sum við vóru frá byrjan. Eitt nú er luttakaratalið hækkað nakað. Men eisini skapið á sjálvari stevnuni er broytt nógv, siga fyrireikararnir.

Tá byrjað varð, var tað soleiðis, at hvørt felag sær sýndi fram tað, tey hvødu vant, meðan hini so vóru ákoðarar og -hoyrarar.

Í dag er stevnan skipað heilt øðrvísi. Í grundini sum ein stór landsumfatandi veitsla, har stevnan fyrst verður sett alment. Síðan verður eitt stórt felagsborðhald, og eftir tað verður farið upp á gólv.

Men her skipar hvørt felag sær eftir tørni sína vísu ella kvæði. Tá tað er liðugt einaferð út móti morgni, verður so vanligur føroyskur dansur, har hvør sum hug og hegni hevur, skipar tað, honum lystir.

### Hugskot úr Vágum

Hugskotið til landsdansistevnuna kom úr Vágum, og fyrsta stevnan varð eisin hildin í Vágum fyri 21 árum síðan. So sigast kann, at nú er hon komin heimaftur.

Tað var táveransi formaðurin í Vága Dansifelag, Jónvør Petersen í Bø, sum kom við hugskotinum á einum aðalfundi hjá landsfelag dansifelaganna, Sláið Ring.

Jónvør Petersen sigur, at hon helt tað vera løgið, um ikki skuldi borið til at skipað fyri eini slíkari stevnu í Føroyum, har øll føroysku feløgini luttóku. Sjálv hevði hon sæð, tá dansiferðir høvdu verið gjørdar uttanlands, at tað bar væl til at savna nógv feløg til slíkar stevnur.

Hon bar tankan fram í Vága Dansifelag, og við fullum stuðuli frá felagnum, legði hon tað so fram á aðalfundinum hjá dansifeløgunum.

Men at skipa fyri eini so stórari stevnu í Vágum fyri 21 árum síðan, var heldur ikki bara sum at siga tað. Tí tá varð stevnan hildin í tríggjar dagar, og øll tey 300 fólkini, sum luttóku stevnuni, skuldu hava innivist í oynni, greiðir Jónvør Petersen frá.

Men eisini tað bar til við hjálp frá fólki í Vágum. Eisini fólki, sum annars einki hevði við Dansifelagið at gera yvirhøvur.

### Spjatt um alla oynna

Nú verður stevnan hildin á einum stað. Við hvuðssæti í ítróttarhølini á Giljanesi, har tann stóri aktiviteturin verður. Eina nátt.

Annað var, tá dansað var kring oynna alt vikuskiftið. Og øll hesi 300 fólkini skuldu hava at eta. Men tá var einki høli til at hýsa teimum øllum í senn. Bygdarhúsið í Miðvági virkaði so sum ein miðstøð, hóast einki var liðugt har. Bara nakrir ráir betongveggir, minnist Jónvør Petersen.

Veitsla var eingin av slíkum slag, sum í dag verður hildin, tá landsdansistevnan er. Hon kom tó í rættiliga skjótt, sigur Jónvør Petersen. Longu á aðru stevnuni, sum hildin varð í Suðuroy, varð gjørd stór veitsla.

Í byrjanini varð avmarkað, hvussu nógv fólk sluppu við á dansistevnu. Mark varð sett við 30 frá hvørjum felag. Og tíggju vóru tá feløgini.

Í dag er eingin avmarking, og feløgini eru eisini fleiri. Tó er talið kortini undir 40 í meðal.

Ein stórur munur í dag í mun til seinast, tá landsdansistevnan varð hildin í Vágum, er sjálvandi Vágatunnilin, sum ger tað møguligt hjá nógvum fólki at sleppa heimaftur beinanveg, liðugt er. Og tað merkist eisini væl á gistingunum.

– Í dag er tað ikki meira enn umleið ein tjúgundapartur av teimum, sum fyrstu ferð vórðu hýst í Vágum, sum hava biðið um hús í samband við stevnuna, sigur Jónvør Petersen í Bø, ið sum formaður Vága Dansifelags í 1983 »uppfann« landsdansistevnuna, har øll føroysku dansifeløgini hittast.






# Havnar hornorkestur bergtók komponistin

**– Havnar hornorkestur fekk tað vakrasta fram. Orðini eigur Alan Fernie, hann sum hevur komponerað tað kravda stykkið, sum øll orkestrini í B bólkinum skuldu framføra til Evropa meistaraskapið fyri hornorkestur**

HORNORKESTUR
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Evropameistararnir avmyndaðir í sambandi við 100 ára haldið hjá orkestrinum*

– Ongin venjing ella nøkur konsert, sum vit hildu undan ferðini, eydnaðist so væl, sum framførslan á pallinum til sjálva kappingina, sigur Kári Olsen, formaður í Havnar hornorkestur.

Hann greiðir frá, at sjálvandi var okkurt smávegis kiks, sum tað aloftast er, tá tónleikur verður framførdur »live«, men tað hevur so ikki verið tað, sum dómararnir hava dømt mest útfrá, heldur Kári. Hann heldur, at kenslurnar, sum orkestrið fekk fram í tónleikinum, hava havt meira at siga í dømingini.

Tað kravda stykkið, sum orkestrini øll framførdu, var eitt skotsk stykki, sum Alan Fernie hevur komponerað. Tað nevndist Airs and Dances, og tað var eyðkendur skotskur tónleikur. Hevði nógvar undirtónar og sekkjapípuljóð og so framvegis. Og hetta er tað, sum komponisturin sjálvur, sum var millum áhoyrarnar, sipaði til eftir, at tað var staðfest, at Havnar hornorkestur hevði vunnið B bólkin.

Kári heldur, at tað er ikki so langt millum skotskan og føroyskan horntónleik, og tað hevur ivaleyst gjørt sítt til, at teimum eydnaðist til fulnar at fáa tann eyðkenda skotska tónleikin fram.

### Góð skrá

Orkestrið framførdi tilsamans seks stykki til kappingina. Skráin legði upp til, at tað skuldi vera undirhaldandi, sindur solistiskt og okkurt heimligt eisini.

Og til tað hevði dirigenturin, Ove Olsen valt vakra lagið Eg skar mítt navn, sum Alan Fernie eisini hevði lagt tilrættis fyri hornorkestur. Hetta gjørdist komponisturin sjálvur tó ikki greiður yvir fyrr enn aftaná framførsluna.

Orkestrið fekk dómarametingina aftaná, og sum Kári sjálvur sigur, so vóru næstan bara lovorð í henni, men so okkurt sum teir eisini hildu, at orkestrið kundi havt gjørt øðrvísi.

Til dømis nevndu teir, at tvey av sjálvaldu stykkjunum betur høvdu hóskað til at spælt úti. Men hóast hetta so ivast Kári ikki í, at skráin hevur gjørt sítt til, at teir vunnu kappingina, tí tað, sum tey hoyrdu av hinum framførslunum, so vóru skráirnar hjá teimum heilt øðrvísi enn hjá Havnar Hornorkestri.

– So tað er skil í okkara dirigenti, hann visti, hvat hann gjørdi, tá hann legði skránna, sigur Kári.

Italia bleiv nummar tvey, Írland nummar trý og Eysturríki fekk fjórðaplássið. Kári greiðir frá, at triði satsur í tí kravda stykkinum skuldi spælast í einum sera høgum tempo. Millum 160 og 180, tað vil siga, um trý sløg um sekundið. Havnar hornorkestur royndi at halda seg so nær við 160 sum tilbar fyri at fáa tónleikin betur fram í stykkinum, meðan okkurt av hinum orkestrunum spældi tað í hægri tempo. Hetta heldur Kári av tí sama gjørdi, at tónleikurin ikki kom til sín rætt.

### Fløvandi móttøka

Kári letur sera væl at móttøkuni, sum orkestrið fekk, tá tey komu aftu til Havnar hóskvøldið.

– Tað fløvaði veruliga, at GHM breyt teirra venjing av fyri at koma at spæla fyri okkum, og at so mong vóru komin at taka ímóti við borgarstjóranum á odda, sigur Kári Olsen.

Hann greiðir annars frá, at øll ferðin gekk fínt uttan busstúrurin frá Aberdeen til Glasgow.

– Flogtúrurin gekk fínt, og ein fyrsta floks, teldustýrdur Volvo bussur stóð fyri okkum at koyra okkum til Glasgow. Men tá vit høvdu koyrt í einar 25 minuttir steðgaði hesin bussurin upp. Vit fingu at vita, at tað fór at taka einar 40 minuttir at gera hann aftur. Men tá samanumkom funnu teir ikki feilin, og tað endaði við, at vit bíðaðu í hálvan fjórða tíma í oysandi áarføri eftir einum øðrum bussi. Og tað var ein trongur og gamal býbussur við ongum wcið, sum vit so vórðu fraktað til hotellið í. Ein koyritrúrur, sum vardi tríggjar tímar. Men, men vit komu so fram í øllum góðum bara nakað nógv seinni enn ætlað, sigur Kári Olsen, formaður í Havnar Hornorkestri.

Og mestur mundi hesin túrur og bíðingin vera væl og virðiliga gloymd, tá Havnar hornorkestur varð kosið Evropameistari í B bólkinum.

# Árins handil á ferð

**Komandi leygardag verður stongt í Idémøblum. Tað er kanska ikki so løgið í sjálvum sær nú møguleikin fyri einum longdum vikuskifti liggur fyri framman, men alt starvsfólkið í handlinum fer eina vikuskiftisferð til Danmarkar, sum tey hava fingið bjóðað frá fyritøkuni**

UTTANLANDSFERÐ
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Ársins handil 2002 og 03 lønar nú sínum starvsfólki, sum tey meta eigur stóran part í heiðurinum fyri at verða kostin ársins handil tvær reisur.

15 starvsfólk fara Dýra Biðidag eina ferð til Danmarkar, har tey verða um vikuskiftið. Tey fara rættuliga at hugna sær og bert slappa av. Ein túr í Tivoli, onkran túrin út at eta góðan mat og annars njóta Keypmannahavn.

– Tað er umráðandi at starvsfólkini eisini fáa høvi at hugna sær saman uttan fyri vanliga arbeiðstíð, heldur Birgir Andreasen.



*Idémøblar lønar nú sínum starvsfólkið fyri heiðurin at verða kosin Ársins handil tvey ár á rað. Komandi vikuskiftið hevur fyritøkan boðið øllum starvsfólkunum eina vikuskiftis ferð til Danmarkar*

*Savnsmynd*

Hann leggur afturat, at tað ikki er meira enn náttúrligt, at starvsfólkini eisini fáa ein part av æruni fyri heitið hjá handlinum.

Í sambandi við kappingina um at gerast ársins handil, vunnu tey bæði, Birgir og Elsebeth, eitt gávukort uppá 15.000 krónur, sum eisini verður nýtt til hetta endamálið. Og so rindar fyritøkan restina, so at øll starvsfólkini kunnu fara hendan túrin.

Næstan øll koma við, okkurt einkult avboð er tó komið. Tey fara sum sagt fríggjadagin og verða aftur í Føroyum sunnudagin.

# Hvalbingur omandottin

**Leygardagin datt 69 ára gamli Sigvald Hentze oman í Norðbergi í Hvalba, tá hann var farin burtur í haga at hyggja at seyði**

VANLUKKA
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

69 ára gamli Sigvald Hentze úr Hvalba er ikki funnin enn, men staðfest er, at hann er dottin oman av ovaru rás í Norðbergi, har hann hevur verið seyðamaður í langa tíð.

Løgreglan og onnur, sum hava leitað, hava funnið nógv greið tekin, sum benda á, at maðurin er farin útav. Leitað hevur síðani verið við gummibáti eftir manninum, men onki funnið.

Sigvald var seinast sæddur í Hvalba leygardagin um 15 tíðina, tá hann segði fyri einari kvinnu, at hann ætlaði sær ein túr burtur í haga. Ein nátaveitsla var seinni sama kvøld í Hvalba, og har skuldi hann havt verið við. Men hann kom ongantíð vegin fram.

Hetta hugsaðu fólk sum so ikki nógv um, men ein, ið regluliga plagdi at vitja Sigvald, fór fram við hjá honum mánakvøldið. Tá var eitt vindeygað opið í húsinum, men ongin maður at finna. Síðani varð leitað í bygdini, og um midnáttarleitið fekk løgreglan fráboðan um, at maðurin var horvin.

### Greið tekin

29 mans frá løgregluni og Suðuroyar-norðara bjargingarfelag fóru beinanvegin út at leita. Leitað varð fyrst har, ið maðurin vanliga plagdi at ganga. Síðani var farið úr eystara enda í haganum og heilt vestur í Norðberg. Tveir menn fóru so til gongu eftir rásini, og á ovaru rás í Norðbergi funnu teir stavin hjá manninum. Og tá byrjaði illgrunin, um at maðurin møguliga var farin útav, at spíra.

Farið varð eisini at leita við tyrlu. Og tá varð annar stylvin og aðrir lutir hjá manninum funnin niðast á tromini, haðani 100 metrar eru beint niður á sjógv.

Síðani fóru sjey mans niður á tromina og har sóu teir merkir í vøllinum, sum kundu bent á, at onkur er farin omanav.

– Útfrá øllum hesum upplýsingunum og at stóra leitingin onki úrslit hevur givið, hava vit staðfest, at maðurin allarhelst hevur gingið eftir ovaru rás í Norðbergi og dottin oman og ikki steðgaður aftur. Men vit fáa okkum illa at trúgva, at tað hevur verið av ósketni, at hann er dottin, tí har er gott at ganga, og hann hevur gingið har alt sítt lív. So tað kundi verið, at hann er vorðin illa fyri á ein ella annan hátt og farin útav, sigur sýslumaðurin á Tvøroyri.

Leitað hevur sum sagt verið á sjógvi eftir manninum, men týskvøldið um hálvgum sjey tíðina varð hendan leitingin steðgað.



*Menn í tyrluni bóru eyga við stylvan og aðrar lutir hjá 69 ára gamla Sigvaldi Hentze úr Hvalba niðast á tromini í Norðbergi*

*Tilvildarlig mynd*